# Nøvn

## Føðingar



*12. apríl fingu Cecilia Nolsøe Poulsen og Magnus Brattaberg Absalonsen, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3700 gr og var 53 cm langur.*



*21. apríl fekk Dávid ein lítlan beiggja. Hann vigaði 3500 gr og var 52 cm langur. Foreldrini eru Joan Hansen og Sverri Vilhelm Klaksvík.*

14. apríl fingu Jonna Joensen og Johan Johannesen, Nesi, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3485 gr.

14. apríl fingu Hjørdis Gregersen og Hans Jørgen Djurhuus, Syðrugøtu, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3650 gr.

15. apríl fingu Diana Solbjerg Mouritsen og Símun Jensen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3575 gr.

17. apríl fingu Aloma Stórá Carlsen og Jamie Findleton, Toftum, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2990 gr.

17. apríl fingu Fía Kristiansen, Gjógv, og Bogi Mørkøre, Eiði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

17. apríl fingu Annika á Borg og Ári Egason Dam, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3200 gr.

17. apríl fingu Bjørg Poulsen og Heini Bendtsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3415 gr.

18. apríl fingu Joan Tróndheim, Klaksvík, og Thomas Hans Lamain Rubeksen, Tórshavn, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2700 gr.

19. apríl fingu Sigursól Jensen og Svenn Ey. Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

19. apríl fekk Sára Tummasardóttir Mortensen, Hoyvík, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4000 gr.

19. apríl fingu Marin Birgarsdóttir Johannessen og Hugin Helgason, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 3980 gr.

19. apríl fingu Henny og Jóhannus Mikkelsen, Skála, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2790 gr.

20. apríl fingu Heidi Elgeirsdóttir Olsen, Tórshavn, og Bárður Olsen, Haldórsvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3695 gr.

20. apríl fingu Vivian Unadóttir og Regin Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3200 gr.

23. apríl fingu Karin og Djóni Joensen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4500 gr.

24. apríl fingu Jóna E. og Poul Anker Zachariassen, Skála, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3700 gr.

25. apríl fingu Marita Hansen og Dan Eli Hellisá, Streymnesi, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3650 gr.

26. apríl fingu Ingrid Mellemgaard og Bergur Andreasen, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3710 gr.

26. apríl fingu Ingigerð og Tóri Slættalíð, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4100 gr.

26. apríl fingu Mirjam og Bárður á Lakjuni, Leirvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

## MC-gudstænasta í Vági



Leygardagin 30. apríl skipa motorsúkklubbarnir Cross-Bikers MC Føroyar og Stormboys fyri MC-gudstænastu í Vágs kirkju.

Skráin fyri dagin er fjølbroytt. Smyril fer av Havnini kl. 7 leygarmorgunin, og kl. 9.30 møtast motorsúkklurnar á Krambatanga. Fyrst verður koyrt til Sandvíkar og síðan til Fámjins, har vitjað verður í kirkjuni og felagssangur verður. Eftir tað verður koyrt gjøgnum bygdirnar Hov og Porkeri á veg til Vágs, har døgurði verður hjá Frelsunarherinum.

MC-gudstænastan í Vágs kirkju verður kl. 14, har presturin Patrick De Neergaard prædikar. Undir guðstænastuni verða trý lokal sanginnsløg við Hans Jakki Hjelm og Jens Johannesen, Evi Tommysdóttir Djurhuus við orkestri og Dagfinn Olsen og Hjalmar Magnussen, skrivar heimasíðan www.cross-bikers.com

## Alex við nýggjari fløgu

**Væl kendi sangarin Alex Bærendsen kemur nú við eini nýggjari fløgu við kendum evangeliskum sangum.**



Fríggjadagin 29. apríl kemur út nýggj fløga, ið nevnist "Dýrabar minni". Tað er kendi sangarin Alex Bærendsen, sum hevur verið í studio og spælt inn 14 kendar evangeliskar sangir. Tað eru 17 ár síðan Alex seinast læt fløgu úr hondum, men hann er samstundis ein tann mest spældi sangarin, sum tey flestu kennast við av fleiri av hansara ymsu útgávum. Tey, ið spæla undir á hesi útgávuni, eru úrmælingar á hvør sínum øki til tónleikin. Talan er um Godtfred Joensen, Jákup Zachariassen, Eyðun Johannesen, og Kristina, dóttir Alex Bærensen. Ein heimsíða er gjørd í sambandi við útgávuna, ið kallast www.alex.fo. har meira fæst at vita um sangirnar og fløguna.